## Mentamálaráðið
FÓLKASKÚLADEILDIN

# Starv sum útoyggjalærari í Mykines skúla

sansir.fo

Starvið sum útoyggjalærari í Mykines skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2008. Komandi skúlaár verða 2 næmingar í Mykines skúla.

**Um starvið**
Útoyggjalærarin er bæði leiðari og lærari skúlans og hevur sjálvur alla undirvísingina í skúlanum.

**Søkt verður eftir útoyggjalærara, sum**
- undir ábyrgd skúlamyndugleikanna skal hava fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans
- skal fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim
- skal vera førur fyri at loysa trupulleikar
- í samstarvi við foreldrini skal virka fyri, at næmingarnir fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum. Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálaráðnum við tænastu í Mykines skúla.

Starvið er flokkað í lønarflokkunum 27.1, 28.1, 29.1, 29.2 og 31.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir saman við avriti av læraraprógvi, skeiðum, frágreiðing um arbeiðsroyndir og møguligum viðmælum skulu verða Mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 15. juli 2008.

**Umsóknin verður stílað til:**
Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella við t-posti: mmr@mmr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, ella Olaus Jespersen, deildarstjóra, tlf. 355050.

Tórshavn, 2. juli 2008
Mentamálaráðið

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

# MÓTTØKA AV ULL

**SIRRI í Vági**
tekur ímóti ull
frá 4. til 30. august 2008

Fyri ull, ið er turr og væl hagreidd, letur Sirri 5,00 kr fyri kilo, sum verður flutt á konto. Neyðugt er at upplýsa konto nr., um tað ikki er latið Sirri áður.

Harumframt fær innlatarin 5,00 kr fyri kilo í stuðulsískoytið, sum verður flutt av Royndarstøðini umvegis Føroya Gjaldstovu á upplýsta konto í peningastovnunum.

Postverk Føroya skipar flutningin til Sirri í Vági, og skal ullin latast í sekkir, ið fáast til keyps á Posthúsunum kring landið fyri 5,- kr. stk. Sekkirnir taka umleið 10 – 12 kilo hvør, og skulu teir vera snørdir og hava spjaldur við navni, bústaði og tlf. nr. hjá sendara á. Postverkið tekur bert ímóti ull í hesum sekkjum. Ullin kann latast inn á Posthúsini í nevnda tíðarskeiði ella avtala kann gerast við Postverkið um at avheinta teir hjá sendaranum. Sirri rindar fyri flutningin.

Tann parturin av ullini, sum ikki kann gagnnýtast, skal vera skildur frá og beindur burtur á staðnum ella á rættini á forsvarligan hátt.

Gjørt verður vart við, at ullamóttøkan skilar sær rætt til at geva lægri ella ongan prís fyri ull, sum ikki kann gagnnýtast, t.v.s ull við skarni, sandi, mosa o.ø. í.

**Royndarstøðin**
Frammi í Dal 166
FO-410 Kollafjørður
Tlf. 47 90 01

**Sirri**
FO-900 Vágur
Tlf. 22 40 06
T-postur: sirri@sirri.fo

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 4. august 2008 kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan »Sudoku«.

Vinningur í juli er 2 M-semiflex flogferðaseðlar við Atlantic Airways. Virði Kr. 6.304, -

Drigið verður aðru vikuna í august.

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.



## JULI-KAPPINGIN

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2 | 5 | | | | | 4 | |
| | | | 6 | 2 | | | | |
| 7 | | | | | 4 | | | 9 |
| | | 2 | 5 | 3 | | | | |
| | | 7 | | | | 5 | | |
| | | | | 6 | 9 | 1 | | |
| 1 | | | 8 | | | | | 5 |
| | | | | 7 | 6 | | | |
| | 3 | | | | | 6 | 2 | |

ATLANTIC AIRWAYS

**Navn:** ____________________

**Bústaður:** ____________________

**Telefon:** ____________________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

### Vinningurin í juli

2 M-semiflex ferðaseðlar frá Atlantic Airways. **Virði Kr. 6.304,-**

SUDOKU Sosialurin